# Nýggj útbjóðing góða undirtøku á tingi




*Kortið vísir økini, sum føroyskir oljumyndugleikar nú fara at bjóða oljufeløgunum í 2. útbjóðing á landgrunninum*

**2. ÚTBJÓÐING**

*Jan Müller*

Í farnu viku varð orðaskifti á tingi um uppskot til nýggja útbjóðing á landgrunninum. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður er fegin um viðgerðina, sum hann heldur var sera lagalig, skilagóð og realistisk.
– Eg merkti mær, at orðaskiftið hesaferð var meira realistiskt enn undan 1. útbjóðing fyri fýra árum síðani, tá vit ikki tosaðu um, um vit funnu olju men meira um nær. Hesaferð var orðaskiftið meira jarðbundið, og tað er gott og merkir, at fólk eru ikki so euforisk. Fólk ásanna, at vit nú kunnu tosa um eitt langt áramál til vit finna olju. Eg havi tí greiðu fatan, at hetta uppskotið verður samtykt av einum samdum løgtingi. (Lesið um viðgerðina á tingi inni í vanliga blaðnum)




*Føroyski landgrunnurin goymir nógvum spennandi avbjóðingum fyri bæði jarðfrøðingar og jarðalisfrøðingar, eitt nú er East Faroe High ryggurin ein av hesum stóru avbjóðingunum og møguleikunum fyri at gera heilt stór olju- og gassfund í undirgrundini*

Bjarni Djurholm um oljuráðstevnu:

# Eitt gott signal at senda út

**OLJUFRAMTÍÐ**

*Jan Müller*

Tað verður Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í oljumálum, sum fer at seta stóru oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum í dag. Hann er sera fegin um, at Jarðfrøðissavnið hevur tikið hetta stigið og heldur, at ráðstevnan kann fáa stóran týdning fyri okkara egnu serfrøðingar og oljufólk, og at tað koma meira enn 100 fakfólk og oljufólk sum heild úr útlandinum, sum hava áhuga fyri føroysku undirgrundini, sigur okkum so mikið sum, at tað er áhugi fyri okkara øki, og tað er eitt sera positivt signal at kunna senda út.

– Eg vóni, at bæði Jarðfrøðissavnið og Oljufyrisiting og øll tey, sum koma úr útlandinum, fara ríkari úr aftur Norðurlandahúsinum eftir ráðstevnuna. Øll útlendsku oljufólkini, sum seta tíð av til hesar báðar dagarnar, skulu vera so hjartaliga vælkomin og vóni eg, at tey eisini geva sær stundir til at síggja okkara vakra land og taka av tí stóra gestablídni, sum altíð er. Sum landsstýrismaður í oljumálum vil eg gera alt eg eri mentur fyri at skapa góðar fortreytir fyri oljufeløgini, sum í framtíðini vilja brúka tíð og orku uppá oljuleiting við Føroyar.



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í oljumálum heldur stóru luttøkna til ráðstevnuna vera tekin um, at áhugi er fyri Føroyaøkinum*
*Mynd Jan Müller*









*Framhald av forsíðuni*

ing, nú fleiri feløg eru ivasom spurdu vit Hera Ziska: - Eg vil heldur spyrja, hví skulu vit bíða. Her er nógv spennandi at fara eftir, og vit eiga ikki at sleppa hesum. Vit mugu royna at sannføra feløgini um, at tey eiga ikki at hava ráð til at rýma. Onkur fer at søkja, og tey fáa tey bestu økini. Spurningurin er, um oljufeløgini hava ráð til at lata vera at koma. Men tað snýr seg eisini um at sannføra tey, sum ikki eru so virkin, um at her kunnu vera spennandi avbjóðingar. Hetta er so partur av tí tøkniligu marknaðarføringini, har vit greiða frá, at tað jarðfrøðiliga loysir seg at leita í føroysku undirgrundini.

Heri Ziska sigur, at henda ráðstevnan hevur verið eitt hjartabarn hjá sær, síðani hann byrjaði í 94. Nú fer hon so av bakkastokki. Talan verður helst um eitt afturvendandi tiltak, men ráðstevnan verður so neyvan á hvørjum ári.

Tað eru kapasitetirnir, sum arbeiða við Føroyaøkinum, ið eru við onkursvegna. Ein gamal kenningur, Richard Hardmann, sum var millum fyrstu útlendsku oljufólkini, ið vístu Føroyum ans, er millum luttakararnar. Hann er ráðgevi hjá føroyska oljufelagnum, Atlants Kolvetni.